





# “Sólin er 8!”

**– Á SvF eru barnasendingarnar av álvara farnar á rull.**

Garasjan er nýggja sendingin til størru børnini, sum er at síggja fríggjadagar og mánadagar.
Sendingin hevur vitjað á ymiskum skúlum í Føroyum og fær eisini vitjan frá hesum støðunum. T.d. hava hevur Garasjan verið í Gøtu, í Tórshavn og komandi ferð vitja tey í Vestmanna. M.a skulu tey dansa hipp hopp og síggja ein heimagjørdan teknifilm, sum ongin nakrantíð fyrr hevur sæð. Eisini práta tey í Garasjuni við børnini um, hvar tey spæla og um, hvat er at síggja har sum tey búgva. Og síðan stuttleika tey sær í Garasjuni.

Ein onnur sending fyri tey størru børnini er Miðlingurin Malcolm, ið snýr seg um unga og serliga gløgga Malcolm. Honum dámar sera væl rok og rumbul. Mamman stríðist hvønn dag fyri at halda skil á dreinginum, sum ofta ger ov nógv um seg í skúlanum. Í 50. parti, sum kemur mánadagin kl. 18.30, hevur Malcolm fingið harða kapping í skúlanum frá einum nýggjum næmingi í klassanum, sum er eitt flogvit.

Doug er ein røð í 22 pørtum til tey stóru børnini og verður send hóskvøld og sunnumorgnar. Doug Funnie býr Bluffvík saman við mammu og pápa sínum og systrini Judi. Hann gongur í Bluffington skúla saman við vinunum.

**Til tey smærru børnini eru fleiri sendingar.**
Hanus Ottar er hanin, sum við sínum kokkalarikói setir alt í gongd sunnumorgnar, tá SvF endursendir fleiri barnasendingar. Tað er hann sum gelur í rópið: “Klokkan er 8!”
Men tíman millum 18.00-19.00 hvørt vikukvøld eiga børnini.
Pyjamasbananirnar báðar B1 og B2 í strípute pymjamasunum, eru at síggja týskvøld og mikukvøld. Saman við Lulu, Amandu, Magnus og Rottu hendir altíð okkurt stuttligt.

Toktummas er sendirøðin í 26 pørtum um eitt fitt lítið tok. Tummas er raskur, arbeiðssamur og næstan altíð í góðum lag. Men onkutíð kemur Tummas illa fyri, tá hann átekur sær okkurt, sum tey stóru tokini heldur áttu at gjørt. Verður víst sunnukvøld og leygarkvøld kl. 18.00.

Sofus og hinar bamsurnar uppliva altíð okkurt ordiliga spennandi. Hendan røðin er í átta pørtum og verður víst hóskvøld og sunnumorgnar.

Eddi og Bjørn er ein virðislønt bretsk røð til tey smáu, sum verður víst mikukvøld og sunnumorgun. Smádrongurin Eddi og besti vinur hansara Bjørn, ein stór bjørn, spæla ofta saman og læra hvønnannan at kenna.

Osvald hetta er ein røð til minnu børnini, sum verður víst mikukvøld og sunnumorgnar. Osvald er ein fittur bláur høgguslokkur, sum hevur nógv vinfólk. Pingvinurin Henri og blóman Dáa eru millum bestu vinirnar. Men tann allarbesti vinurin er hundurin Villy, sum altíð er við honum.

Jólakalendarin byrjar eisini skjótt, nú jólamánaðurin nærkast av álvara. 1. desembur opnar mann jú fyrstu lúkuna av teimum 24. Heitið á jólakalendaranum hjá Svf er í ár “Jól á Posthúsinum”. Til ber eisini at koma sjálvur við í jólakalendaran. SvF ynskir at hyggjarar senda egnar upptøkur av onkrum fittum á umleið tveir-tríggjar minuttir inn til jólakalendaran. Bandið skal verða sent innan 15. novembur til Postvarp Føroya, Boks 21, 110 Tórshavn.














**Knýt rottuhalarnar …**

**… tí stjørnurnar loysa teymarnar.**

Við einum CanalDigital-haldi verða børn og barnsligar sálir undirhildnar av øllum teirra góðu vinum - Tom & Jerry, Spiderman, Scooby-dooby-doo og øllum hinum - allan dagin

Kom inn á gólvið og tosa við okkum um teir ymisku pakkamøguleikarnar.

Møguleiki er eisini fyri at tekna DR1 og DR2-hald.

Family við Canal+
299,- pr. mðr
Nokia móttakari*
990,-
Skálkampur
990,-



*Treytað av 12 mðr. Family við Canal+ haldi. Harumframt 390,- kr. fyri stovnan og fyrsta hálvárliga kortgjaldið

- tað er munur á!

Family við Canal+

SISERO 351800

AP-Radio
Klaksvíksvegur • 700 Klaksvík
Tel 21 64 50 • Fax 45 73 50

G.F.Elektronik
Birnugøta 31 • FO-100 Tórshavn
Tel 31 02 54 ella 21 02 54

Radiohandilin OPUS
620 Runavík • Tel 47 99 99

RADIOHANDILIN
v/ Echardt & Pola Persson Sp/f
Niels Finsensgøta 16 - Tel 318277

Tel 37 35 00 ella 21 35 00

P/F Sørvágs Radiohandil
380 Sørvágur - Tel 33 26 14

CANAL DIGITAL






VARPIÐ